# Gevið ljóð

Stutt vegleiðing um, hvussu spælt verður.

**Eitt stuttligt útispæl, har øll kunna vera við og, sum kann vara eitt heilt kvøld.**

**Til spælið skal nýtast træpettir og/ella krit.**

Luttakarnir deila seg í tveir bólkar. Annar bólkurin krógvar seg, meðan hin bólkurin telur upp í 100.

Tá teljandi bólkurin er liðugur at telja, skal hann leita eftir hinum bólkinum, sum hevur krógvað seg.

Tann bólkurin, sum krógvar seg, brúkar kritið og træpettini til at gera pílar, til tess, at vísa hvønn veg tey eru farin. Tey sum krógva seg, kunnu altíð flyta seg meðan leita verður.

Bólkurin, sum leitar, skal so finna pílarnar og fylgja teimum. Um tey ikki finna pílarnar, rópað tey "Gevið ljóð". Bólkurin, sum krógvar seg, skal so geva eitt ljóð frá sær, soleiðis at leitandi bólkurin kann ganga eftir ljóðinum



GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Niels Finsensgøta 37 · Postboks 132 · 110 Tórshavn · Tlf:562 300 · www.gigni.fo